# N FÓLK TIL PENING





Bæði sjón- og útvarpsstøðir spurdu føroyska eygleiðaran um føroysk viðurskifti



*Serliga hjá eldri fólki, sum minnast Franco-tíðina, er tað sum ein dreymur at sleppa at atkvøða um catalanskt sjálvræði. Hóast tað bara er súmbolskt...*



*... men tey smæstu sluppu eisini at vera við*



*Summastaðni bjóðaðu fyrireikararnir bæði paella og vín*

meira futtur í politikkinum har enn her...

## Góð undirtøka

Politiska luttøkan er vanliga ikki stór í Catalonia – einans millum 40 og 50% taka lut, tá val er.

Kortini hevur tað higartil eydnast fyrireikarunum av hesum fólkaatkvøðunum – uttan nakran almennan stuðul – at fáa væl yvir 25% at fara á val. Tvs. at helvtin av teimum, sum velja á veruligum valum, geva sína meining til kennar á hesum valunum. Hóast tey væl vita, at tað onga beinleiðis ávirkan fær...

Tá alt var talt saman sunnukvøldið, høvdu 20,2 % av teimum 1,3 milliónunum atkvøtt. Ella omanfyri 260.000 fólk.

At næstan øllum søgd JA til spurningin um, hvørt Catalonia skuldi vera eitt sjálvstøðugt land í ES, var ikki so óvæntað. Tað er fullveldissíðan sum skipar fyri hesum, og tí eru tað nærum bara fólk hagani, sum taka lut.

Gleðin var stór á fyrireikarunum, tá tað vísti seg, at so nógv høvdu tikið lut. Tí tað hevur verið eitt ódnartak at skipa fyri hesum. Tilsamans hava eini 25.000 fólk givið sítt íkast við sjálvbodnum arbeiði, og nógv hava eisini stuðlað fíggjarliga.

## Leggur trýst á

Ein av fyrireikarunum er Quim Arrufat, sum samskipaði luttøkuna hjá eygleiðarunum. Hann greiðir soleiðis frá orsøkini til, at skipað verður fyri hesum:

– Í 2005 samtykti catalanska parlamentið við stórum meiriluta eitt »Estatut« – eitt slag av catalanskari grundlóg. Henda grundlóg bleiv síðani nógv amputerað av sponskum myndugleikum, sum søgdu hana vera í stríð við sponsku grundlógina. Men hon var kortini løgd til fólkaatkvøðu í 2006, har hon varð samtykt við greiðum meiriluta.

– Men nú hevur konservativi høgraflokkurin í Spania (Partido Popular) lagt hesa samtyktu grundlógina til spanska grundlógardómstólin, har tað verður kannað, um tað, sum er eftir av henni, er í samsvari við sponsku grundlógina. Og alt bendir á, at hon verður enn meira amputerað. T.d. er ætlanin at strika greinina sum sigur, at catalanar eru ein tjóð, greiðir Quim frá.

– Henda gongd hevur fingið øði í nógvar catalanar. Tey allar flestu – eisini tey, sum ikki taka undir við fullum sjálvræði – halda, at catalanar hava rætt at gera av sína egnu framtíð. Tey góðtaka ikki, at spanska grundlógin stendur omanfyri viljan hjá catalanska fólkinum. Og tað er m.a. fyri at geva fólki høvi at vísa hesa ónøgdina á ein konstruktivan hátt, at sjálvstýrisvongurin skipar fyri fólkaatkvøðunum.

– Men tað er eisini fyri at gera fólk virkin, og á tann hátt styrkja okkum politiskt og organisatoriskt. Hóast meiriluti er fyri sjálvsavgerðarrættinum, er ikki meiriluti fyri at skipa Catalonia sum ein stat. Nógv arbeiði skal gerast, fyri at fáa henda meiriluta. Men at vit klára at skipa fyri hesum - og at so nógv fólk taka lut - gevur sjálvstýrishugaðum fólki hug og dirvi at halda fram, sigur Quim

## Hvat merkir hetta

Hvat úrslitið merkir - og hvat tað skal brúkast til – veldst um, hvønn tú spyrt.

Sambandssíðan sigur hetta vera prógv um, at einans ein minniluti – góð 20% – vil hava loysing frá Spania, og at spanski politikkurin tí er í samsvari við viljan hjá meirilutanum. »ENN EIN FIASKO« segði forsíðan á tí størsta sambandsblaðnum mánadagin eftir atkvøðuna.

Tann moderati sjálvstýrisvongurin sigur úrslitið vera gott, og at tað skal nýtast til at leggja trýst á sponsku stjórnina í samráðingunum um størri catalanskt sjálvræði.

Og frá tí víðgongda sjálvstýrisvonginum verður sagt, at bara tað, at tey megna at skipa fyri hesum — alt við sjálvbodnum arbeiði – vísir, at nógvir catalanar brenna fyri sjálvræðinum. Tað er langt eftir á mál, men rørslan hevur stórt grundarlag, og fleiri aktivistar enn nakar annar.

## Hálv millión

Undir øllum umstøðum er greitt, at hesi stóru tiltøkini seta spurningin um catalanskt sjálvræði á dagsskránna. Tí í veruleikanum er talan um størsta politiska mótmæli í Catalonia nakrantíð. Ja, tað verður trupult at finna nakað størri í Europa yvirhøvur.

Tilsamans eru 6,5 milliónir catalanar, og í øllum fýra fólkaatkvøðunum hava nú 500.000 atkvøtt. Tá atkvøtt verður í Barcelona um eitt ár, verður talið munandi hægri.

Eitt politiskt tiltak við so stórari luttøku, kann ikki ignorerast. Øll mugu hava eina meining um tað. Kjakið kyknar upp, argument mugu brýnast, og gamlar meiningar verjast. Og tá til stykkis kemur, er tað júst tað, sum flytir politisk mørk.